StÍF-VÍF 23-19 (13-9):

# Kreppustøða í Vestmanna

**Av trimum teimum fyrstu dystunum, hevur VÍF tapt tveir, og tað eru sigursvandu hondbóltsmenninir als ikki vanir við**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast teir royndu, so fekk VÍF ongan tíð glið á álopsspælið, og tí megnaðu teir sjáldan at gerast ein verulig hóttan móti strandingunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hondbóltshýrurin í Vestmanna er ikki tann besti í hesum døgum. Í øllum førum ikki á mannfólkasíðuni, har besta liðið hevur fingið ringastu byrjanina í mannaminni upp á kappingarárið.

Seinasta vikuskiftið fekk VÍF ein ordans bakkaláara, tá Neistin tók alt í Vestmanna, og aftur sunnudagin lógu teir undir, tá meistararnir úr StÍF tóku ímóti.

Og einki er at siga til, at tað vóru strandingarnir, sum tóku stigini hesaferð. Tó at tað gekk javnt á størsta partin av dystinum, so var heimaliðið alla tíðina eitt vet frammanfyri. Serliga í verjupartinum gekst væl hjá heimaliðnum, sum alla tíðina hevði eitt sera gott tak á stóru skjúttunum hjá VÍF.

Og tó at álopsspælið enn ikki hevur fingið gullerðina á, so fer tað nú at benda tann vegin, sum vit so ofta hava sæð strandingar spælt. Serliga varð hetta sjónligt, tá VÍF valdi at fara út í mansverju av Sveini Justinussen. Hetta fekk sjálvsagt tikið størstu skothóttanina hjá StÍF úr spælinum, men hinvegin gav hetta restina av liðnum hjá StÍF betri pláss, og tað dugdu fótfimu menninir at gagnnýta. Serliga í økinum frá bakki til vongspælara megnaðu teir at smoyggja sær ímillum, og í nógvum førum spurdust brotskøst burturúr. Brotskøst, sum Alexandur Johansen fyri tað mesta tók sær av, og her var hann ósvikaliga tryggur. Ikki færri enn átta ferðir royndi hann seg av sjey-metra strikuni, og hvørja ferð varð úrslitið hitt sama. Ein kassi afturat til strandingarnar, og so fekk VÍF ikki gjørt stórt annað enn at gera eina høpisleysa roynd at fanga meistararnar aftur.

Sum vera man, so var lagið gott á Strondum eftir dystin, men tað er synd at siga, at støðan er hin sama í Vestmanna. Talan er um vánaligastu byrjanina upp á árið í nógv ár, og tá vit fingu orðið á ein av leikarunum, Sámal Joensen, duldi hann ikki fyri, at hetta var ein lítið hugalig støða.

– Fyri at siga tað pent, so er hetta nakað lort. Lagið er í botni eftir seinastu avrikini, og tað ringasta er kanska, at vit eisini hava spælt somikið illa. Móti Neistanum var trupulleikin kanska, at vit brendu ov nógv, men hesa ferð komu vit næstan ikki til møguleikar, og í nógvum førum vóru skotini heldur ikki nóg góð. Og at vit bara fáa 19 mál í einum dysti sigur eisini nakað um, hvussu illa álopsspælið hevur riggað, heldur Sámal.

– Vanliga plagar tað jú at vera so, at vit leggja bragdliga fyri í hondbóltsárinum, og í ár hava vit eisini verið á venjingarlegu undan kappingini. Tað er í øllum førum nakað, sum plagar at geva eitt gott skump til fyrstu dystirnar, men tað hevur tað so ikki gjørt hesferð, heldur hann.

– Tað hevur verið ført fram, at ein av orsøkunum hjá VÍF til tungu gongdina er, at Áki Olsen enn ikki er tøkur, men so einfalt vil Sámal ikki gera tað til.

– Tað kunnu vit ikki nýta til nakað. Áki var eisini darvaður av skaða tað nógva av árinum í fjør, so tann umberingin heldur ikki ordiliga.

Og sambært stóra skjúttanum, so er heldur ikki nøkur einføld uppskrift til at fáa spælið í rættlag aftur.

– Nú hava vit so tíggju dagar frí frá heimligu landskappingini, og tað kann so kanska koma væl við. Enn er talan kanska ikki um nakra veruliga kreppu, men tað er einki at siga til, at lagið er í botni. Einasta troystin í so máta er kanska tann, at talan í veruleikanum bert um tvey – og ikki fýra – stig, sum eru mist. Og so kunnu vit taka eitt stórt fet rætta vegin, tá vit aftrur skulu í eldin. Tá kemur Kyndil á vitjan, og vinna vit har, so eru vit við aftur, sigur hann.

Og at enda, so tykist Sámal eisini hava eina lítla hóttan til mótstøðuliðini, og kanska eisini eina troyst til viðhaldsfólkini.

– Vit kunnu so bara troysta okkum við, at hóast vit hava spælt út av lagi vánaligt, so hevur talan verið um teprar ósigrar. Megna vit at lyfta okkum eitt lítið sindur, so fer tað kanska at venda. Eitt er víst. Verri enn tað sama verður tað so ikki.

### Dysturin í tølum

**StÍF-VÍF 23-19 (13-9)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Alexandur Johansen 10(8), Mihai Marinescu 4, Sveinur Justinussen 3(1), Andre F. Danielsen 3, Artur Johansen 1, Sverri Justinussen 1, Mortan Hansen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 6(2), Ingi Olsen 5(2), Harald Bjørgvin 2, Johnny Joensen 2, John Zachariasen 1, Agnar Joensen 1, Daniel Rápa 1, Áki G. Olsen 1
**Brotskøst:** StÍF 12, VÍF 5
**Útvísingar:** StÍF 5, VÍF 6
**Dómarar úr Neistanum:** Kristian Johansen & Sámal Hansen

# Leirvíkingar sum í gomlum døgum

**Annað árið á rað eydnaðist tað old boysunum í Leirvík at vinna gullkrónurnar, sum gravgangurin ikki var so stórur eftir, sum skipanin legði upp til**

OLD BOYS FM
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*LÍF. FM vinnarar í old boys 2003. Standandi frá vinstru: Páll Lervig venjari, Berg Vatnhamar, John Olsen, Tórolvur Joensen, Joen Magnus Rasmussen. Húkandi frá vinstru: Jógvan Júst Olsen, Ólavur Olsen, Ovi Joensen, Óli Høgnesen, Páll Joensen. Bjørn Krog, Hans Mourits Foldbo, Richard Jacobsen og Óla Jákup Joensen spældu eisini við, men teir eru ikki á myndini*

Í ár gekk tað striltið hjá 2. deilarliðnum í Leirvík. Tað var ikki fyrrenn í endaumfarinum, at teir í kapping við teir næstbestu hjá EB/-Streymi komu undan niðurflytingini og bjargaðu sær plássinum í deildini.

LÍF var mest sum øll átttati árini partur av bestu deildiniÍ áttati árunum var eingilsktmaðurin Martin Nudgent og spældi fótbólt í Leirvík, og tá var LÍF við til at mynda toppin í fótbóltskappingini. Longst rukku teir í 1984 og í 1985, tá ið teir endaðu á fjórða plássinum.

Síðsta ferðin LÍF var í bestu deildini var í 1993.

Fleiri av teimum, sum vóru á besta liðnum miðskeiðis í áttati árunum, hugna sær nú í old boys kappingini. Har hevur tað tvey tey seinastu árini hilnast væl. LÍF vann gullkrónurnar í fjør, og aftur í ár fingu teir gullkrónurnar handaðar.

Sambært kappingarskipanini var upprunaliga ætlanin, at trettan lið skuldu kappast í tveimum bólkum – sjey í A bólkinum og seks í B bólkinum. Í hvørjum bólkinum skuldu øll liðini so spæla ímóti hvørjum øðrum fýra ferðir, og so var ætlanin at runda av við finalu og dysti um fjórða plássið.

Men soleiðis varð tað ikki. Eingin kapping varð avgreidd í A bólkinum, og so varð avgjørt, at B bólkurin skuldi vera FM bólkur. LÍF og SÍF møttu til allar fýra kappingarnar – á Sandi, í Leirvík, á Eiði og í Sandavági. Hini liðini vóru B68, ÍF, B71 og EB/-Streymur. Tey møttu ikki øll hvørja ferð.

Tað var rættuliga javnt millum LÍF og SÍF. Á Sandi vann LÍF 4–1 á SÍF, og í Leirvík vann SÍF 4–1 ímóti LÍF. Í hinum báðum dystunum millum hesi feløgini var úrslitið 1–1. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað stóð púra javnt í innanhýsis uppgerðunum. Men SÍF misti trý stig ímóti øðrum feløgum. LÍF misti einki stig burtursæð frá ímóti SÍF. Tí vóru leirvíkingar bestir, og SÍF endaði á øðrum plássi.



# HM í kviktalvi

**Sekstan sterkir stórmeistarar, harav nærum allir í topp 10 í heiminum, telva í hesum døgum HM í kviktalvi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Lítið hevur verið at hoyrt um kappingina undan startskotinum, og tað kann tykjast merkiligt tá nærum øll heimselitan er savnað til HM í kviktalvi í Cap d´Agde, sunnast í Frankaríki. Hóast talan er um kvikktalv (25 min. til hvønn telvara + 10 sekund fyri hvønn leik), er kappingin sjálvsagt eitt hæddarpunkt í talvkalendaranum í heyst.

Í topp tíggju er tað einans Kasparov, ið ikki luttekur. Harafturímóti luttaka fýra heimsmeistarar, Karpov, Kramnik, Anand og Ponomariov, og tveir HM-avbjóðarar, Shirov, sum tapti HM finaluna í ár 2000 móti Anand og Leko, sum hevur vunnið sær rættin at bjóða Kramnik av í nærmastu framtíð.

Umframt hesar talvstjørnur, kunnu nevnast aðrar stjørnur; Topalov, Bareev, Grischuk, Svidler, og Polgar.

Júst Polgar er eitt áhugavert evni fyri tíðina. Hon hevur havt ein ótrúligan góðan stima seinasta árið, og á feskasta styrkilista hevur hon 2722 ratingstig, sum er eitt deilt tíggjunda pláss saman við landsmanninum Leko. Hon vann herfyri eina kapping í Hollandi, sum viðførir fleiri ratingstig til hennara. Næsti altjóða ratinglisti verður kunngjørdur 1. januar 2004.

Eisini Svidler hevur havt eitt óvanliga gevandi talvár. Hann hevur at kalla vunnið alt sum hann hevur nortið við, og nærkast alsamt skjótari topp trý í heiminum. Hann hevur 2723 á oktober-listanum, men fer at fáa eitt áljóðandi umleið 2750 á komandi ratinglista. Kasparov hevur síðani januar 1985 havt hægsta ratingtal í heiminum, og enn er einki broytt í hesum. Russiska livandi legendan hevur 2830, Kramnik hevur 2777, meðan Anand liggur á triðja plássi við sínum 2766 ratingstigum.

### Knock-out skipan

Sekstan telvarar eru umboðaðir í kvikkappingini, fyrst býttir upp í tveir bólkar. Í báðum bólkunum fóru fýra víðari til fjórðingsfinalur. Sunnukvøldið bleiv bólkaspælið avgreitt. Í tí eina bólkinum vunnu Kramnik, Ponomariov og Bacrot við hálvum fimta stigi av sjey møguligum. Tann fjórði í røðini, og harvið eisini víðari, varð Topalov.

Í hinum bólkinum vann Svidler við fimm stigum. Grischuk, Anand og Polgar fóru saman við Svidler víðari til fjórðingsfinalurnar, sum í skrivandi løtu ikki eru leiktar. Eitt nú megnaði Shirov og Karpov ikki at kvalifisera seg víðari. Serliga illa gekk tað hjá 52 ára gamla fyrrverandi heimsmeistaranum. Hann fekk einans hálvtannað stig av sjey møguligum og tykist útbrendur.

### Hans Kristian í Norra

Føroyski normjagstrarin Hans Kristian Simonsen luttekur í einari IM-kapping í Gausdal. Í skrivandi løtu hevur Hans Kristian tvey stig av sjey møguligum, og tískil eingin normur á hesum sinni. Føroyingurin hevur ikki fingið góða spælið frá IM kappingini í Klaksvík á glið, hevur higartil einki talv vunnið í Gausdal, men vónandi fær hann ein góðan enda á kappingini. Ellivu umfør skulu telvast.

Martin Poulsen fer í næstum til Ungarns at telva tí kendu 1st Saturday kappingina. Hesar verða leiktar hvønn mánaða, altíð við byrjan tann fyrsta leygardagin í mánaðinum. Í novembur byrjar kappingin 1. novembur, og Martin er sloppin í IM-bólkin. John Arni Nilssen vann sær sín seinna IM-norm júst í somu kapping í august.

## Talvið hesa vikuna

Anand,V (2766) - Polgar,J (2722)
Cap D'Agde FRA (4. umf), 25.10.2003

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 a6 6.f3 Fb6 7.g4 Ric6 8.Rib3 e6 9.Fe2 Fc7 10.Be3 (Hetta er ein ikki so heilt eyðkend støða í sisilionsku byrjanini) 10...b5 11.0—0—0 Rid7 12.Ff2 b4 13.Rie2 Bb7 14.Ried4 Rixd4 15.Rixd4 d5! (Sagt verður, at um svartur fær uttan trupulleikar leikt d5 í sisilionskum, hevur svartur fyrimun) 16.exd5 Bxd5 17.Kb1 Bc5 18.h4 0—0 (Anand hevur einki nevnivert í støðuni, og má helst taka til takkar við at verja seg, sum hann tó ikki kláraði væl) 19.Be2 Rfc8 20.Rd2? (Bd3 betri) Bxd4! 21.Bxd4 Støðumynd



Støðumynd eftir 21.Bxd4

21...Bxa2+! 22.Kc1 (Um: 22.Kxa2 Fa5+ 23.Kb1 (tað verður mát innan fáir leikir um leikt verður Kb3) 23...b3 24.cxb3 Fxd2) 22...Bb3 23.Kd1 Bxc2+ 24.Ke1 Ba4 (Talvið er avgjørt. Anand hevði í vanligum talvi lagt kongin, men talan er um kviktalv, og tíðin spælur tískil ein størri leiklut) 25.Be3 Rie5 26.Fh2 Ric4 27.Fxc7 Rxc7 28.Bxc4 Rxc4 29.Kf2 Rac8 30.Kg3 Rc2 31.g5 e5 32.h5 f5 33.gxf6 gxf6 34.Rd6 Kf7 35.Rd2 f5 36.f4 Rxd2 37.Bxd2 Rc2 38.Rh2 Rxb2 39.fxe5 b3 0—1

VB-Kyndil 32-13 (14-6):

# Einvegis ferðsla



**VB staðfesti uttan stórvegis trupulleikar oddastøðuna, tá tær vundu burtur úr eimum tomum Kyndils-liði**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki stórvegis at gera hjá Kyndli, tá tær vitjaðu í Vági leygardagin. Á pappírinum var einki at ivast í, at VB vóru risafavorittar at taka stigini, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn sigurin varð mest sum staðfestur. Eftir fyrstu 20 minuttirnar stóð longu 12-2 á máltalvuni, og tó at Kyndil eftir hetta fekk fylgt betri við, so var tað ongan tíð nær námind so, at gestirnir høvdu hug at hótta heimaliðið.

Tvørturímóti var tað ferð eftir ferð sjónligt, at Kyndil hevði trupult við at fáa nakra veruliga hóttan í lag móti VB-verjuni, og ferð eftir ferð kundu tær á heimaliðnum so senda kontraálop avstað. Kontraálop, har serliga Rannvá Augustinussen veruliga slapp at dusa sær.

### Brak í Klaksvík

Hjá Kyndli var hetta nokk ikki meira enn ein staðfesting av, at tað so ikki verður móti oddaliðunum, at liðið skal rokna við nøkrum stigum. Einamest munnu tað vera dystirnir móti Søljuni, sum skulu gera av, hvørt liðið skal halda fram í bestu deildini eisini komandi ár, tó at tað ikki kann útilokast, at okkurt stigið eisini fer at koma aðra staðni frá.

Hjá VB er talan tó ikki um sama høvuðbrýggj. Har er tosið fyrst og fremst um, hvussu liðið skal halda fast í oddasessinum. Einfaldasta uppskriftin til hetta er uttan iva at halda á fram við sigursrøðini. Komandi avbjóðingin í so máta er í Klaksvík, og einki er at ivas tí, at har kann talan gerast um eina uppgávu av teimum heilt truplu. Ikki minst, tí Stjørnan fer at seta alt inn uppá at fanga VB aftur, men tað eru tær so ikki einsamallar um at gera av.

### Dysturin í tølum

**VB-Kyndil 32-13 (14-6)**
**Málskjúttar**
**VB:** Rannvá Augustinussen 14, Aukse Vysniaskaite 5(3), Gurið Mortensen 5, Margreth Augustinussen 3, Eydis Kjærbo 3, Jacoba Poulsen 1, Laila Jespersen 1
**Kyndil:** Anita Kjærbo 5, Súsann Petersen 4, Anja Heinadóttir 2, Fía Selma Nielsen 1, Ann-Mari Wang 1
**Brotskøst:** VB 4
**Útvísingar:** Kyndil 1
**Dómarar úr TB:** Kári Niclasen & Birgir Dimon